*– Tú ert sonur eina terrorist-skøkju.*

*Tað, sum Marco Matarazzi sambært fólki, ið dugir munnlestur, skal hava sagt við Zidane, áðrenn Zidane stútaði hann í bringuna*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# ÍTRÓTTUR

# Tríggir mugu bíða til á Ólavsøku




*Fýra bátsmanningar kunnu vinna føroyameistaraheitið longu í næstseinasta FM-róðrinum á Vestanstevnu. Aðrar kappingar verða ikki avgjørdar endaliga fyrr enn á ólavsøku*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Úrslitini í Vestmanna lagaðu tað soleiðis, at fýra bátar fara at vinna FM, tá ið tað leygardagin fer at verða kappast á Vestanstevnu**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í trimum av sjey róðrum var talan um sama vinnara í Vestmanna leygardagin, sum tað var í Vági tvær vikur frammanundan. Ritan við dreingjum, Jarnbardur við kvinnum og Sølmundur við monnum endurtóku sigursbragdið úr Vági.

Í fýra av róðrunum var talan um annan vinnara. Genturnar á Havfrúnni megnaðu ikki í heimasjógvi at endurtaka óvæntaða bragdið í Vági. Í Vestmanna var tað Blikur, sum vann gentukappingina. Sílið við kvinnum vann fyri fyrstu ferð í ár í Vági. Í Vestmanna var avrikið hjá Sílinum tað vánaligasta í ár. Ørnin, sum hevði vunnið tríggjar tær fyrstu kappingarnar, var aftur hesa ferð ógvuliga sannførandi.

### Spennandi hjá teimum stóru

8-mannafarið Ørvur vann í Vestmanna. Knørrur vann tvær tær fyrstu ferðirnar. So vann Ørvur á Eystanstevnu. Tað vil siga, at Ørvur og Knørrur nú fleiri ferðir hava skiftst um at vinna sera tøttu kappingina.

Og so var tað Klaksvíkingur, sum við sera sannførandi róðri setti Eysturoying upp á pláss. Eysturoyingur vann trivaligan sigur á Jóansøku.

Úrslitini í Vestmanna bera við sær, at tað í fýra av teimum sjey FM kappingunum ivaleyst verður avgjørt í Sandavági leygardagin, hvør verður meistari. Ørnin við kvinnum er tættast at meistaraheitinum. Tær í Sandavági eru átta stig undan Sílinum, og tí er alt lagt upp til, at Ørnin í heimasjógvi fer at ogna sær FM. Sjálvandi er ynskið hjá teimum umborð á Ørnini, at tað skal gerast við manér.

### Summi mugu bíða til ólavsøku

Dreingirnir á Rituni eru seks stig frammanfyri Jallin, menninir á Sølmundi eru seks stig framman fyri Sundabátin, og Klaksvíkingur er seks stig undan Eysturoyingi.

Í trimum kappingum bendir nógv á, at tað verður neyðugt at bíða inntil á Ólavsøku, áðrenn meistarin verður funnin. Í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum hevur Riddarin 29 stig, Lómur hevur 25 stig, og Jarnbardur hevur 24 stig. Tað er ein lítil møguleiki fyri, at Riddarin fer at vinna FM leygardagin.

Ørvur rennur aftaná Knørri í kappingini millum 8-mannaførini. Um Knørrur ikki skal gerast meistari, so skal Ørvur ivaleyst vinna bæði á Sandavági og á Ólavøku. Mest spennandi kappingin er tann millum 5-mannafør við gentum. Frúgvin, sum fyrr í summar var rættuliga sannførandi, er framvegis fremst, men fjarstøðan aftur til Blik er bara eitt stig.

# Ørnin helt avtalurnar

**Sannførandi sigurin á Fjarðastevnu var staðilig uppreisn eftir einstaka kiksaran á Jóansøku**

5-MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Tað var púra óvæntað, tá ið Ørnin ikki kom fyrst á mál á Jóansøku í Vági. Gongdin í trimum teimum fyrstu kappingunum var, at sigrarnir gjørdust alt meiri sannførandi. Og so var tað, at Ørnin á Jóansøku varð tikin av Sílinum.

Í Vestmanna var yvirhøvur eingin ivi. Ørnin var millum teir fremstu beinanvegin. Eftir startspurtin løgdu tær úr Sandavági seg framum fleiri bátar, sum vóru í tættari kapping um næstfremsta plássið. Á málinum var Ørnin meiri enn leys av teimum næstu.

Kappingina um næstfremsta plássið vann Jallurin, sum var ein skut framman fyri Rituna og Sílið.

Eingin ivi var umborð á Ørnini um, hví sigurin í Vestmanna var so sannførandi, og hví tað ikki hilnaðist so væl í Vági:

– Hesa ferð hildu vit alla tíðina avtalurnar, sum vit hava innanhýsis. Tað gjørdu vit ikki í Vági. Hesa ferð gjørdu vit tað, sum vit hava arbeitt okkum fram til undir venjingunum, og tað var stóri munurin millum sigurin hesa ferð, og tá ið vit ikki vunnu í Vági, søgdu tær á Ørnini eftir fjórða sigurin í ár.

Ørnin hevur nú 33 stig, meðan Sílið, sum stóð seg minni væl í Vestmanna, hevur 25 stig. Eingin annar kann røkka Ørnini uttan Sílið. Átta stig eru millum tveir teir fremstu bátarnar, og harvið skal tað vita sera illa við hjá Ørnini, um tað ikki skal eydnast at vinna FM heitið í heimasjógvi nú leygardagin.

### Úrslit 5-mannafør kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Ørnin | 05:11.02 | |
| 2 | Jallurin | 05:15.13 | GK |
| 3 | Ritan | 05:16.02 | |
| 4 | Sílið | 05:16.11 | |
| 5 | Drekin | 05:17.03 | |
| 6 | Junkarin | 05:20.24 | |
| 7 | Tjaldrið | 05:22.09 | GK |
| 8 | Tekla | 05:32.12 | GK |
| 9 | Blikur | 05:59.06 | |

## Støðan í FM-kappróðrinum

**5-mannafør dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1. Ritan | 32 | |
| 2. Jallurin | 26 | |
| 3. Kollur | 19 | |
| 4. Havfrúgvin | 12 | |
| 5. Sílið | 10 | GK |
| 6. Strípan | 9 | |
| 7. Blikur | 2 | |
| 8. Drekin | 0 | |

**6-mannafør kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1. Riddarin | 29 | GK |
| 2. Lómur | 25 | |
| 3. Jarnbardur | 24 | |
| 4. Smyril | 15 | |
| 5. Hvessingur | 11 | |

**5-mannafør gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1. Frúgvin | 27 | |
| 2. Blikur | 26 | GK |
| 3. Drekin | 17 | |
| 4. Havfrúgvin | 17 | |
| 5. Hvassi | 14 | 2GK |
| 6. Firvaldur | 4 | |
| 7. Ørnin | 3 | |
| 8. Dúgavn | 3 | |
| 9. Firildur | 0 | |
| 10. Sílið | 0 | |

**5-mannafør kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1. Ørnin | 33 | |
| 2. Sílið | 25 | |
| 3. Jallurin | 19 | GK |
| 4. Ritan | 17 | |
| 5. Junkarin | 9 | |
| 6. Drekin | 7 | GK |
| 7. Tekla | 0 | GK |
| 8. Tjaldrið | 0 | GK |
| 9. Báran | 0 | GK |
| 10. Blikur | 0 | |

**6-mannafør menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1. Sølmúndur | 33 | |
| 2. Sundabáturin | 27 | |
| 3. Jarnbardur | 20 | |
| 4. Smyril | 10 | |
| 5. Gongurólvur | 9 | |
| 6. Hósvíkingur | 8 | |
| 7. Páll Fangi | 3 | |
| 8. Kollfirðingur | 0 | |
| 9. Lómur | 0 | |
| 10. Arnfjarðabáturin | 0 | GK |
| 11. Fortuna | 0 | |
| 12. Víkingur | 0 | |

**8-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1. Knørrur | 31 | GK |
| 2. Ørvur | 29 | GK |
| 3. Argjabáturin | 19 | |
| 4. Nevið Reyða | 16 | |
| 5. Kvívíkingur | 2 | GK |

**10-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1. Klaksvíkingur | 31 | |
| 2. Eysturoyingur | 25 | |
| 3. Havnarbáturin | 18 | |
| 4. Skálabáturin | 15 | |
| 5. Vestmenningur | 14 | GK |
| 6. Nólsoyingur | 7 | |
| 7. Vágbingur | 0 | |